# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Kaj Leo Johannesen:

## Fult álit á Alfred

Tað er væl kent, at Alfred Olsen hevur tikið fyrivarni í sambandi við stuðul sín til samgonguna. Ament hevur hann boðað frá, at samgongan ikki skal rokna við hansara stuðli. Men hettar órógvar ikki Kaj Leo Johannesen, formann Sambandsflokksins.

»Eg havi alla tíðina sagt, at eg havi fult álit á Alfred Olsen. Eg skal ikki siga, at eg eri samdur við framferðini í sambandi við hetta eina málið, ið førdi til ósemjuna millum Alfred Olsen og samgonguna, men eingin ivi skal vera um, at Alfred er ein av allarmest seriøsu tingmonnunum yvirhøvur, og tí havi eg eisini fult álit á, at Alfred fer at atkvøða hareftir«, sigur Kaj Leo Johannesen.

Formaðurin í Sambandsflokkinum kennir seg so tryggan í, at Alfred er trúgvur móti Sambandsflokkinum – og harvið pr. definitión samgonguni – at tað als ikki kom honum til hugs at meta Alfred Olsen sum farnan úr samgonguni, tá løgtingsnevndirnar vórðu valdar av nýggjum í síðstu viku.

**- leo**

Løgtingsnevndirnar valdar av nýggjum:

# Samgongan mist meirilutan í Trivnaðarnevndini

**Nú løgtingsnevndirnar blivu valdar av nýggjum, hevur breiða samgongan mist meirilutan í Trivnaðarnevndini**

NEVNDARVAL
*Leo Poulsen*
*Leo@sosialurin.fo*



*Alfred Olsen hevur tikið stuðul sín til smgonguna aftur, og tí hevur hon ikki longur – á pappírinum í hvussu er – meirilutan í Trivnaðarnevndini. Men Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, hevur fult álit á partamanninum*

Tað má metast sum lagnunnar speisemi, at breiðasta samgongan í mannaminnir nú í hvussu er á pappírinum hevur mist meirilutan í Trivnaðarnevdini.

Hetta hendi, tá løgtingsnevndirnar vórðu valdar av nýggjum mikudagin í farnu viku. Sambandsflokkurin valdi nevniliga at lata Johan Dahl og Alfred Olsen skifta um sess í ávikavist Trivnaðar- og Vinnunevndini, og tá seinni nevndi greitt hevur meldað út, at hann ikki er partur av samgonguni og tískil ikki stuðlar henni, kann hann heldur ikki metast at vera partur av samgonguni í Trivnaðarnevndini.

Men hóast Alfred Olsen hevur sagt seg ikki stuðla samgonguni, var hann kortini við til at afturvelja formansskapin í Trivnaðarnevndini. Har er Jørgen Niclasen framvegis formaður og Finnur Helmsdal næstformaður.

Jørgen Niclasen sigur tó, at hann ikki óttast fyri samstarvinum í nevndini.

»Eg havi verið limur í nógvum nevndum, og tað eru fáar, sum hava verið so vælvirkandi sum sitandi Trivnaðarnevnd. So eg havi fult álit á, at nevndin framhaldandi fer at virka eins væl og higartil«, sigur Jørgen Niclasen.

### Skift um

Men samstundis, sum samgongan altso á pappírinum hevur mist meirilutan í Trivnaðarnevndini, hevur hon styrkt sær meirilutan í Vinnunevndini. Har loysir Johan Dahl nevniliga Alfred Olsen av og tað merkir, at samgongan nú hevur 5 av teimum 7 limunum í nevndini.

Annars eru broytingarnar í nevndarlimum hesar: Av fólkaflokslimum hava Óli Breckmann og Jógvan við Keldu skift um sess soleiðis, at Óli nú er limur í Mentanarnevndini og Jógvan í Uttanlandsnevndini. Karsten Hansen úr Miðflokkinum og Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum eru farnir úr Landsstýrismannanevndini og fyri teir eru komnir Annita á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum og Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum, og síðani er Alfred Olsen farin úr Rættarnevndini og Kaj Leo komin í hansara stað.

Annars eru nevndirnar óbroyttar, burtursæð frá onkrari smávegis flyting millum varalimirnar.




